# Ávísar hættisligar sjúkur

Álvarslig sjúka kann hava fíggjarligar fylgjur. Vit bjóða tær at víðka tína Lívstrygging ella Restskuldartrygging til at fevna um eina trygging, sum veitir útgjald í sambandi við álvarsliga sjúku, og sum sostatt tryggjar teg fíggjarliga, skuldi sjúka borist á.

## Børn

Hevur tú børn, fevnir tryggingin eisini um børn tíni frá føðing, til tey eru 18 ár, um tey fáa eina álvarsliga sjúku. Talan er bæði um biologisk og ættleidd børn hjá tær og hjá tínum hjúnafelaga.

## Hvør kann tekna tryggingina?

Tryggingin fyri ávísar hættisligar sjúkur verður teknað sum ískoyti til eina Lívstrygging ella eina Restskuldartrygging.

Tað er tí ein treyt fyri at tekna trygging við ávísum hættisligum sjúkum, at tú eisini hevur Lívstrygging ella Restskuldartrygging frá LÍV við eini tryggingarupphædd á í minsta lagi 575.000 kr.

Harumframt skalt tú vera millum 18 til og við 50 ár, og tú skalt kunna útflýggja eina nøktandi heilsuváttan. Tryggingarfulnaðurin heldur uppat, tá tú nært fólkapensjónsaldri, og fyri børnini, tá ið tey fylla 18 ár.

## Prísur og tryggingarupphæddir

Tú kanst velja eina tryggingarupphædd á annaðhvørt 115.000 kr. ella 230.000 kr. og tilhoyrandi tryggingarupphædd fyri børn, sum er ávíkavist 69.000 kr. ella 130.000 kr. Upphæddin verður útgoldin, um sjúkan verður staðfest í tryggingartíðarskeiðinum, og um tú lýkur tryggingartreytirnar. Eingi krøv eru til, hvussu peningurin skal nýtast.

Hevur tú valt, at tryggingargjaldið skal takast av eftirlønargjaldinum, kann samlaði kostnaðurin fyri allar tínar tryggingar í mesta lagi vera 1/3 av móttikna eftirlønargjaldinum.

| **Tryggingarupphædd** | **Gjald um mánaðin** |
|---|---|
| 230.000 kr. fyri vaksin og 130.000 kr. fyri børn | 166.75 kr. |
| 115.000 kr. fyri vaksin og 69.000 kr. fyri børn | 86,25 kr. |

## Útgjald

Útgjaldið verður goldið út í einum, um tú fært staðfest eina av teimum sjúkum, sum tryggingin fevnir um.

## Skattur

Tryggingarupphæddin verður útgoldin skattafrítt.

Neyvari treytir fyri útgjald, hvørjar sjúkuavgerðir eru fevndar og undantøk eru at finna í tryggingartreytunum fyri Samlagstrygging. Hevur tú, áðrenn tryggingartíðin byrjar, fingið staðfest eina álvarsliga sjúku, er henda sjúkuavgerð ikki fevnd av tryggingini.



Føroya Banki · Tlf: 330 330 · www.bankin.fo